# Ein persónlig tøkk til Gud

**Væl av fólki vóru samankomin í Miðlahúsinum í gjárkvøldið, tá Lovsongsbólkurin í Filadelfia hevði útgávukonsert. Sungin vórðu løg av nýggju fløgu teirra "Nær hjá tær".**

FLØGA
*Snorri Brend*

Fløgan hevur longu verið at hoyrt í teimum trimum útvarpsrásunum, men hetta var so fyrsta ferðin at almenningurin hevði høvið at hoyra hesi ungu fólkini syngja live.

Tað sum gjørdi hesa framførsluna so livandi var, at fleiri teirra sungu sangir, sum tey sjálvi høvdu skrivað.

Íalt spældu tey 10 løg, sum vóru rættiliga ymisk í stíli, men í innihaldi vóru tey kortini eins: Øll ynsktu at peika á Hann, sum hevur skapt okkum øll og sum tí ynskir at vera nær hjá okkum.

Fløgan, sum kom út í farnu viku, fæst til keyps um alt landið. Og sum skilst er hon væl dámd av fólki.

### Persónlig tøkk

Á útgávukonsertini vóru fýra tónleikarar og fleiri sangarar, sum uppá skift framførdu hesi 10 løgini.

Ein teirra var 23 ára gamla Mia Jacobsen úr Havn, sum hevur skrivað sangin, hon kallar "Tú skapti meg".

Hesin sangurin kom til mín í einum tíðarskeiði, tá eg hevði eina tunga tíð. Men mitt í øllum hesum tunga, kom tað til mín, hvør hevði skapt meg, og hví Hann gjørdi tað.

Út frá hesum kom so hesin sangurin, sum er ein persónlig tøkk til mín Gud, sigur Mia Jacobsen, sum annars gongur á pedagogskúla í Havn.

Nevnast kann, at beiggi hennara, Dánjal eisini sang fleiri sangir og kona hansara, Gunvør eisini fleiri. Í onkrum sangi sungu tey bæði duett.




Gunnvør Jacobsen á odda fyri Lovsangsbólkinum í Filadelfia



Eva er ófør songkvinna. Her í stilla lagnum "In silence"

Tað er sum nevnt Lovsangsbólkurin í samkomuni Filadelfia sum hevur givið hesa fløguna út við heitinum "Nær hjá tær".

Sum skilst liggur enn nógv tilfar klárt, so hvør veit – kanska verður tað til eina fløgu aftrat einaferð seinni.

# Bussarnir skulu koyra longri og longur

**Býráðið í Havn er farið undir at endurskoða Bussleiðina. Sum skilst er ætlanin at økja bæði um túratalið og at lata bussarnar koyra longur út á kvøldið um vikuskiftini**

BUSSAR
*Snorri Brend*

**Havn:** - Koyr ókeypis við Bussleiðini í Havn!

Hetta ljóðar sum ein dreymur hjá mongum, sum dagliga gera nýtslu av býbussunum í Havn. Men komandi ár verður hetta veruliga gjørligt – men bert í eina viku, væl at merkja.

Komandi ár fer nevniliga aftur at verða skipað fyri teirri serstøku Umhvørvisvikuni, har ruddast skal allastaðni í kommununi fyri at gera býin bæði reinan og fríðan.

Sum ein part av hesi vikuni er ætlanin somuleiðis at bjóða fólki ta tænastuna, har borgararnir sleppa at koyra ókeypis við bussunum hesa vikuna.

Við hesum ynskir býráðið at fólk skulu læra at gera nýtslu av Bussleiðini, samstundis sum tey lata bilin standa heima við hús.

Tað eru helst fleiri borgarar í Havn sum ongatíð hava koyrt við bussunum. Men vit vóna, at mong fara at taka bussin hesa serstøku vikuna – og ikki minst aftaná!, sigur Marin Katrina Frýdal, sum er forkvinna í Teknisku nevnd.

### Oftari og longur

Henda ætlanin er bert ein liður í arbeiðinum at endurskoða Bussleiðina í framtíðini.

Hetta arbeiðið er farið í gongd, og gongst sum ætlað verða munandi broytingar settar í verk longu eftir summarsteðgin komandi ár.

Eitt arbeiði er nú farið í gongd við at finna fram til, hvussu Bussleiðin kann verða til enn størri nyttu og gleði fyri borgararnar í býnum.

Lítil ivi man vera um, at mong fólk helst vildu gjørt brúk av hesi tænastuni, men fyri mong er hetta busssambandið ikki nøktandi.

Orsøkirnar til hetta eru tvinnandar:

Í fyrstu atløgu er støðan hon, at bussarnir ikki koyra nóg ofta í dagtímunum, tá sum mest er av fólki, ið kundu gjørt brúk av tænastuni.

Í øðrum lagi verður ofta havt á máli millum manna, at bussarnir gevast at koyra alt ov tíðliga um vikuskiftini. Hetta rakar serliga tey, sum búgva í útjaðarinum av býnum.

Hesar kærurnar og hesa misnøgdina hevur Marin Katrina eisini hoyrt, og er samgongan tí sinnað at bøta munandi um hetta í komandi ári – bæði við øktum túratali og longri koyring.

Hetta er eisini í tráð við ætlanina í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu. Her stendur m.a., at ætlanin er at økja um busskoyringina, samstundis sum ein vónar at minka um ferðsluna í miðbýnum í Havn.

Á henda hátt vóna vit at Bussleiðin kann gerast eitt veruligt alternativ til alla ferðsluna í býnum: At fólk lata bilin standa heima við hús og nýta bussarnar ístaðin, sigur Marin Katrin Frýdal.



*Tað eru helst mong, ið ongatíð hava koyrt við Bussleiðini. Tað skal nú broytast, ætlar býráðið*

### 2700 ferðandi

Hagtøl fyri Bussleiðina vísa, at teir sjey býbussarnir flyta í miðal 2.700 fólk um dagin á teimum fýra leiðunum í Tórshavn og á Argjum.

Haraftrat verður koyrt úr Kollafirði til Tórshavn og aftur fimm ferðir dagliga gerandisdagar, og somuleiðis úr Tórshavn til Kaldbak og aftur fimm ferðir dagliga.